# Uppgávuhugskot

## *Vinurin*
## *Tey í 5. B*



**Læraravegleiðing**

Bókin *Vinurin* er onnur bókin í røðini um 5. b. Tað er Helle Thede Johansen, sum hevur skrivað bókina.
Eins og í fyrru bókini *Vikarurin* er tað, sum eyðkennir røðina um 5. b, at søgurnar fara fram í dag. Næmingarnir kenna seg aftur í hendingum og í umhvørvi, og hetta í sær sjálvum gevur flokkinum nógv at práta um.

Ætlanin við hesi vegleiðing er at geva hugskot til, hvørji evni lærarin kann arbeiða við við støði í bókini *Vinurin.* Hugskotini byggja á tilgongdir, har næmingurin kannar og hugsar sjálvstøðugt. Endamálið er sostatt ikki at kanna eftir, um næmingarnir hava fingið alt við. Mælt verður til, at lærarin gjøgnumgongur einstøku kapitlarnar saman við næmingunum. Dentur verður lagdur á kjak um kapitlarnar heldur enn upplestur ein og ein.

Í bókini *Vinurin* eru nógv ymisk evni at taka upp, og tað kann tykjast øgiliga rúgvusmikið og tíðarkrevjandi at arbeiða við so nógvum evnum, sum her verða víst á. Men tað er heldur ikki meiningin við hesum hugskotum. Lærarin hevur møguleika at velja burturúr tey hugskot, ið hann heldur vera áhugaverd, ella sum hann heldur hóska til flokkin, hann undirvísir í. Hvør flokkur er bæði serstakur og ymiskur. Framferðarhátturin byggir á ta fatan, at næmingar, flokkar og lærarar tíbetur eru ymiskir, og besta úrslitið fæst, um lærarin sjálvur leggur arbeiðið til rættis og lagar tað til flokkin. Harumframt varðveitir lærarin háttarfrælsið.

Tað er stuttligt at fara í djúpdina við onkrari bók, sum flokkurin lesur, og so kann mann velja ikki at lesa onkra aðra bók so neyvt. Hevur t.d. onkur næmingur mist onkran av sínum kæru, er evnið “Sorg” viðkomandi og upplagt at arbeiða við. Er happing í flokkinum, verður evnið um happing viðgjørt o.s.fr.

Eitt annað, sum vert er at hugsa um viðvíkjandi hugskotum sum hesum, er at læra næmingar at leggja arbeiðið fram. Nú nýggju námsætlanirnar verða tiknar í brúk, og verkætlanir eru kravdar, er ongantíð ov tíðliga at læra næmingarnar at leggja fram. Evni og hugskot sum hesi leggja upp til framløgur. Harumframt eru tey eisini góð hugskot til stíl, bólkaarbeiði ella evnisarbeiði.

**Telduspøl og kjatt/kunningartøkni**

Teldan er komin fyri at vera. Hon er sera hent, men altíð er eitt men - vit mugu brúka telduna við skili. Tosið um fyrimunir og vansar - **gylta millumvegin** -

**Vansar:** Vit sita ov nógv (ov lítil rørsla)
Vit brúka ikki okkara talumál.
Vit brúka øðrvísi skriftmál.
Vit hava onki sosialt samskifti.
Vit liva okkum ov nógv inn í ein annan veruleika.
SI – trupulleikar eru nógvir í dag.

**Fyrimunir:**
Størri møguleikar at hava samband við umheimin.
Skjótari samskifti.
Lætt at fáa upplýsingar.
Vit kunnu gerast meira sosial.
Vit koma betur at kenna lívskor hjá øðrum.

Sí grein í Skúlablaðnum nr. 4. 2011- Gitte Klein, lærari, skrivar um *ADHD – lærarin fær skyldina!*

Sí eisini á netinum *Dátueftirlitið,* sum hevur givið ein bókling út, ið eitur *Tað er tín avgerð 2.* Í bóklinginum eru góðar uppgávur, og hann snýr seg um, hvussu børn og ung kunnu ferðast tryggari á internetinum.
Til ber at fáa flokssett av bóklinginum frá Dátueftirlitinum.
www.datueftirlitid.fo

Í føroyskari og danskari frílesing hóska krabbabókin ***Tóra og kjattið*** (Trine Bundsgaard) og ***Besat af chat*** (Gillian Philip) væl til prátið um telduspøl og kjatt í fimta flokki.

Kjatt á internetinum er høvuðstema í bókini. Anna nýtir nógva tíð framman fyri telduni.
Hon ger av at hitta kjatt-vinin, men tað verður eitt stórt vónbrot ...
Tryggari internetdagur er eitt árligt afturvendandi tiltak, har tað verður varpað ljós á tryggari internetnýtslu á ymiskan hátt.
Í Føroyum varpa Dátueftirlitið, Miðlaráðið og Barnabati ljós á henda dagin og heita á allar fólkaskúlar í landinum um at vera við. Har eru 10

góð ráð um góða siðvenju á netinum og 5 punkt um at seta mørk og kjatta trygt. Sí dátueftirlitið.

**Uppgávusugskot: Telduspøl og kjatt**

- Telduvørðurin ella lærarin tosar við næmingarnar um, hvat er gott/ringt við at brúka teldur. Hvussu langa tíð tey brúka til teldu/telduspøl um dagin.
- Gevið næmingunum ein vanligan tekst, sum tey skulu skriva á kjattmáli.
- Gevið næmingunum ein tekst á kjattmáli, sum tey skulu skriva vanligt.
- Tosið við næmingarnar, um tey fáa ávísa tíð um dagin til teldu/telduspøl.
  Tosið um hvat tey sjálvi halda um henda spurningin.
- Tosið eisini um handskrift.
- Arbeiðið við bóklinginum frá Dátueftirlitinum/uppgávur "Tað er tín avgerð 2"
- Kjakist um, hví Anna man nýta so nógva tíð á netinum, og hví hon man lúgva seg eldri, enn hon er.
- Hví man Anna nýta smyrsl, tá hon skal hitta Mikkjal?
- Hvat er ein barnalokkari?
- Halda tit at tað, sum hendi Onnu, kann henda í veruleikanum ?
- Kenna tit øll, sum tit kjatta við?
- Hvat gera tit fyri at kenna tykkum trygg á netinum?
- Gjøgnumgangið bóklingin frá Dátueftirlitinum um tryggari kjatt á netinum.

Sjómaðurin

Fiskur er okkara høvuðsvinna. Tí hevur verið sera vanligt, at pápar havi verið sjómenn. Summir pápar hava verið burturi stóran part av árinum, og tí hevur mamman havt nógvar leiklutir í heiminum.
Samfelagið broytist, men kortini eru nógvir sjómenn, um ikki so nógvir sum fyrr. Tó man arbeiðsmynstrið helst vera broytt soleiðis, at sjómenn eru ikki so leingi burturi nú sum fyrr.
Í eini sjómansfamilju man tað helst eisini vera so, at hon skal laga seg til broytingar alla tíðina. Tí verður gerandisdagurin eisini skiftandi; tað veldst alt um, pápin er heima, ella pápin ikki er heima.
Dømi í bókini (s. 4) og (s. 7) vísa, hvussu Barbara er kedd, tá pápi hennara er farin av stað.

Samfelagsbroytingar hava ført við sær, at bæði foreldur arbeiða nógv úti. Eisini tykist tað, sum bæði foreldur og børn skulu náa alt. Tað førir so aftur við sær, at gerandisdagurin verður sera friðleysur og gevur ikki nógv rúm fyri stórvegis felags familjusambandi. Ofta man familjan nóg illa samlast um máltíðirnar. Eitt gott dømi um slíka støðu er, tá Anna fær pengar fyri mat, tí foreldrini eru so nógv úti. Eingin er heima at tosa við, so tí situr hon nógv framman fyri telduni.

Tað er altíð stuttligt at fáa ein gestalærara inn í skúlastovuna. Hetta halda næmingar vera bæði spennandi og øðrvísi í mun til gerandisdagin.
Í hvørjum flokki eigur onkur helst ein pápa, ið er sjómaður.
Lærarin kann spyrja í flokkinum, hvør eigur pápa, sum er sjómaður, og hvør eigur pápa, sum arbeiðir á landi. So verður spurt, um til ber at koma ein skúlatíma og greiða frá arbeiðnum.
Næmingarnir kunnu gera spurningar til reiðar ....

**Uppgávuhugskot: Pápi er sjómaður**

- Siglandi pápin greiðir frá. Næmingarnir seta spurningar
  Hvat er gott og hvat er ringt.

- Heimaarbeiðandi pápin greiðir frá. Næmingarnir seta spurningar
  Hvat er gott og hvat er ringt.

- Samanberingar hjá hesum báðum. Gott og ringt.

- Tað kundi verið áhugavert at hoyrt, hvat næmingurin hjá siglandi pápanum sigur um, hvussu tað er at eiga ein pápa, ið siglir.
  Hvat er keðiligt?
  Hvat er gott og hví?

- Setið orð á hvørjar kenslur munnu koma fram, tá pápin fer av stað (longsul, sorg, einsemi)

- Setið orð á, hvørjar kenslur munnu koma fram, tá pápin kemur heim. (gleði, væntan, spenningur ...)

- Sorg og longsul verða ofta tengd at einum, ið er burturstaddur t.d. einum pápa.
  Ber til at samanbera sorg og longsul eftir t.d. einum pápa, sum er sjómaður og eftir einum pápa, sum t.d. er skildur frá mammuni ?
  Hvør er munurin?

- Ber til at kenna einsemi hóast bæði foreldrini arbeiða á landi?

- Kjakist um hvussu Anna hevur kent seg, tá pápin ikki hevði stundir til at eta saman við henni, men í staðin gav henni pengar til mat.

- Kunnu pengar bøta um einsemi?

**Deyði**

Flestu skúlar í dag hava eina "Tilbúgvingarætlan", ið varpar ljós á viðurskifti hjá børnum í sorg. Tilbúgvingarætlanin er vegleiðandi og er eitt hent amboð hjá lærarum, so hann veit, hvussu fram skal farast, um so er, at ein næmingur missir ein av sínum næstu.

Fyrr varð ikki tosað nógv um deyðan. Tað tosið varð onkursvegna tagt burtur. Soleiðis var tað bara tá. Í dag er øðrvísi. Opinleiki er umráðandi. Tað verður meira tosað um øll viðurskifti, og um ein næmingur missir ein av sínum næstu, verður tikið hond um hann beinanvegin og eisini tíðina eftir, soleiðis at tosað verður meira opið um tað, sum hent er, hvussu gongst honum o.s. fr. sjálvandi uttan at blanda seg ov nógv í privatlívið. Tað veldst alt um, hvussu næmingurin er av lyndi. Summi børn vilja tosa um tað, sum hent er, onnur vilja ikki. Tað er upp til læraran at meta um. Í bókini *Vinurin* missir Bergur vinmann sín og er ikki nógv fyri at tosa hart um tað. Soleiðis eru vit so ymisk. Í slíkum førum hevur tað eisini stóran týdning at virða ymiskleikan hjá næmingunum.

Prátið um fyrr og nú:

Fyrr búðu tey gomlu ofta heima hjá børnum ella øvugt og doyðu heima – deyðin var tá sjónligari og meira natúrligur.
Nú búgva tey gomlu ofta á ellisheimum og doyggja har ella á sjúkrahúsi.

Í sambandi við deyðan er áhugavert at tosa um mótsetningar: lív/deyði – gleði/sorg – ljós/myrkur.

Hetta prátið kundi farið fram í einum floksins tíma, har allir næmingar sita í rundingi, so teir síggja hvør annan, meðan tosað verður, og ein og ein sleppur til orðanna.
Tilfar til henda floksfund kann vera ein mynd, sum allir næmingar fáa eitt eintak av, og sum hóskar væl til prát um lív og deyða**.** T.d. ***Linedanseren*** s. 6 - 7 í bókini "Lad os tale om det" samtaleoplæg til en smule filosoferen for elever på mellemtrinnet av Eiler Jensen. Forlaget Resen, 2005
Á www.skolefila.dk ber til at bíleggja hesa bók.

Dømi um aðrar bøkur, ið hava sorg og deyða sum evni eru: At liva í allar ævir eftir Sally Nicholls, Grímubýurin eftir Mary Hoffmann og Angin av vanilju eftir Liina Talvik.

Myndagreining er gott hugskot, Tað ber til at tosa um deyðan gjøgnum myndlist.

Ein vitjan á Listasavni Føroya er sera áhugaverd. Har er møguleiki at verða víst runt og fáa frágreiðing um ymisk listaverk, t.d. myrku og døpru málningarnar av Mikinesi. Til ber at ringja til Ogga Lamhauge, ið hevur skúlarnar um hendi, og avtala tíð við hann.

Listasavn Føroya tlf. 313579 – infoart.fo – www.art.fo

**Uppgávuhugskot**

- Tað er ringt at tosa um deyðan. Hví eru vit bangin at tosa um hann?
- Hví ræðast vit, at fólk fara at gráta?
- Nógv ræðast at nærkast einum líki. Hví man tað vera?
- Hvussu man lærarin og næmingar fyrihalda seg til ein næming, ið hevur mist ein av sínum næstu nú á døgum?
- Spyrjið heima, hvussu tað var fyrr viðvíkjandi hesum spurningi.
- Hvussu man tað kennast at koma aftur í skúla hjá einum næmingi, sum hevur mist ein av sínum næstu?

**Sorg**

Bergur verður øgiliga keddur og syrgir, tá vinmaðurin doyr, men er ikki so nógv fyri at tosa um sorgina.
Jóhanna ber eisini sorg, tí pápi hennara er deyður. Hon roynir at seta orð á, men øll tiga bara, tí tey vita ikki, hvat tey skulu siga.
Viðvíkjandi hesum evni er upplagt at tosa um kenslur. Hvat er sorg? Hvat er longsul/gleði/vreiði/flóvisligt/ótti/stúran/?

**Uppgávuhugskot: Sorg**

- Hvat er sorg?
- Nær syrgir man?
- Halda tit, vinirnir í bókini, á onkran hátt, kundu hjálpt Jóhonnu í sorg hennara?
- Ímyndið tykkum, at tit høvdu mist onkran góðan (familju, vin, djór) Setið orð á, hvussu tað kennist.

**Bøkur:**
*Sådan føles SORG - Sådan føles VREDE - Sådan føles KÆRLIGHED*

Allar bøkurnar eftir Mattias Danielsen, Caroline Ginner, Eva Lindstrøm, Forlagið Klematis A/S, Aalborg. 2008 www.klematis.dk

Víst kann eisini vera á krabbabøkurnar um ***Ignoru*** . Í teimum eru sera nógv góð evni, sum eru frálík at taka upp í sambandi við prát um kenslur.

***Berin*** er sjálvhjálparbólkur, stovnaður í 2002, ið hjálpir børnum og ungum í sorg. info berin.fo –
http://www.bornungesorg.dk

Næmingarnir kunnu skriva stíl um evnið. T.d. “Sorg” ella “At missa”

**Deyði og sorg** eru evni sum sjálvsagt kundu verið viðgjørd í einum

**Orðatøk/søga og samtíð**

Næmingar brúka sera nógv sms/teldu. (harav sms - kjattmál)
Alt gott um tað, men lærarar síggja nú, at orðatilfeingið er vorðið nógv minni og fátækari enn fyri bert fáum árum síðani. At arbeiða við orðatøkum er ein upplagdur møguleiki til at hjálpa eitt sindur upp á at ríka um orðatilfeingið.
At arbeiða við orðatøkum er nakað, sum børnum dámar. Tað er stutt og ítøkiligt, og so leggja tey upp til kjak, t.d. um orðatakið sigur teimum nakað í dag. Haraftrat læra tey nýggj orð og vendingar.

Nýtslan av orðatøkum ríkar málið og ger tað livandi og málandi. Tað kunnu vit øll vera samd um.
Hesin dýrabæri skattur er partvís enn livandi í okkara tilvitan. Mátin at úttrykkja okkum, tá vit skulu leggja serligan dent á okkurt sum vit siga, verður við einum orðataki úttrykt sterkt og lýsandi.
Tað liggur nógvur lærdómur í orðatøkum, tey eru sigandi og lærandi og ikki minst til umhugsunar hjá okkum øllum.

Hetta kann gerast ein spennandi tími/tímar. At arbeiða við orðatøkum gevur møguleika til djúphugsan, kjak millum næmingar og kjak við foreldur, ommur og abbar.

Lærarin greiðir frá um skaldskap av mannamunni.
Sambært bókini *Steinur brestir ...* er áhugaverdur inngangur um uppruna, funktiónir, týdning o.a.

Arbeiðið kann leggjast til rættis sum ein lítil verkætlan:  24 næmingar (4 í hvørjum bólki). Uppgávan er bundin. Lærarin gevur hvørjum bólki sær eitt ávíst orðatak at arbeiða við. Teir kunnu tá spyrja heima um hetta orðatak, hvør merking/boðskapur liggur í tí, og í hvørjum samanhangi tað verður nýtt o. s. fr.

**Uppgávuhugskot** (bólkaarb.)

- Tosa um skaldskap av mannamunni.
- Být næmingarnar í bólkar.
- Hvat er eitt orðatak?
- Biðið næmingarnar spyrja um orðatøk heima.
- Hvat er eitt orðatak?
- Finnast nøkur av okkara orðatøkum í øðrum londum?
- Kopierið/glærið orðatakið til at heingja upp í skúlastovuni.
- Framløga av bólkaarb. um orðatakið. Frágreiðing/dømi/boðskapur.

**Bøkur:**


Isholm, Páll og Petersen, Hjalmar P.: *Steinur brestir fyri mannatungu – tiltaksorðabók á føroyskum.* Forlagið Brattalíð, 2003.

Isholm, Páll ritstj.: *Fátt er betri....- 1196 orðatøk á føroyskum*. Forlagið Brattalíð, 2009.

Hammershaimb, V. U. : *Færøsk Anthologi* 1891 (1991)

Fororð eftir William Heinesen í *"44 færøske ordsprog"* eftir *Hedvig Malmstrøm*

Holbek, Bengt og Iørn Piø*: Alverdens ordsprog – 4444 ordsprog fra hele verden.* Politikkens forlag A/S, 1985

Krag, Ole: *Alverdens ordsprog og talemåder – 9000 ordsprog fra 200 sprogområder og 5 årtusinder.* Stig Vendelkærs Forlag, 1995.

**S, P ella K**

Prátið um spælið. Hvussu og hvat. Hava tey roynt tað áður, og um so er hvat halda tey um tað?

Flestu skúlar hava helst tað, ið kallast lesiløtur – t.e. eina ella tvær ferðir um árið lesa næmingar í uml. 15. min hvønn morgun í 3 - 4 vikur. Tá er møguleiki, at allur flokkurin lesur somu bók.
*T.d. S, P ella K* eftir Moni Nielsen

**Kjak um bókina!**

**Uppgávuhugskot: S, P ella K**

- Vit royna spælið.
- Hvat er stuttligt og hví?
- Hvat var ikki stuttligt og hví?
- Kann happing vera í spælinum?
- Kunnu loynidómar avdúkast í spælinum?
- Kenna tit líknandi spæl, ella hvussu kundi man broytt júst hetta spælið til tað betra?

Annað uppskot er at lesa *Teskispælið* eftir Morten Dürr.
Í bókini er Anna nýggj í flokkinum, hon er smæðin og sigur ongantíð nakað.
Ein dagin spæla børnini teskispæl og Anna sleppur við. Tá teskar hon knappliga: "Pápi mín slær meg."
Hetta er ein viðkomandi søga um at fáa nakað at vita av óvart, sum tú gjarna vit gera nakað við.
Teskispælið er ein krabbabók, sum uppgávur eru gjørdar til. Tær eru at finna á heimasíðu okkara:
http://www.bfl.fo/Bøkur-(old).aspx?ID=887&PID=&ProductID=PROD716

**Smyrsl**

Í tannárunum skal so mangt roynast. Tað er kul at smyrja sær, halda nøkur, meðan onnur ikki hugsa serliga nógv um hetta at smyrja sær. Soleiðis eru vit menniskju tíbetur so ymisk.
Anna er 12 ár. Hon smyr sær, tá hon skal møta telduvininum Mikkjali, hóast hon veit, at mammuni ikki dámar tað. Hon vil tekkjast Mikkjali.

Men hvat er tað, sum vekir hugin til smyrsl hjá gentum?
Gerið samrøður við nakrar gentur og vitið, hvat tær siga um tað.

Broyting er eisini komin í millum dreingir viðvíkjandi smyrsli. Fyri bert fáum árum síðani var óhoyrt at dreingir t. d. litaðu hárið. Nú er tað púra vanligt.
Gerið samrøður við nakrar dreingir og vitið, hvat teir halda um tað.

Biðið heilsufrøðingin tosa um sjálvsvirði, sjálvsálit og ymiskleika.

**Uppgávuhugskot: Smyrsl (bólkarb.)**

- Spurningar til gentur/dreingir, ið smyrja sær.
- Spurningar til gentur/dreingir, ið ikki smyrja sær.
- Hvat er gott, og hvat er minni gott við at smyrja sær.
- Hvønn mun ger tað, um ein genta nýtir smyrsl.
- Er tað hóskandi, at dreingir smyrja sær?
- Hvør er munurin millum gentur og dreingir viðvíkjandi smyrsli?
- Summir dreingir lita hárið og brúka t.d. eyeliner, kjakist um, hvat tit halda um tað.
- Bið heilsufrøðingin tosa um sjálvsvirði, sjálvsálit, bólkatrýst og mótaheimin.
- Bólkarnir leggja fram.

**Íblástur til kjak:**
Javnstøða.
Munur millum kyn.
Líkjast genta og drongur meir og meir hvørjum øðrum.

**Her er gott at leggja dent á:**
Ávirkan frá lýsingarheiminum – miðlunum
Týdningin av at standa ímóti bólkatrýsti (at hvíla í sær sjálvum ... “eg eri eg, og eg eri nóg góð/ur júst sum eg eri”, vísir styrki og menning, at tora at vera seg sjálv/sjálvur

**Vinskapur**

Menniskjað er ein sosialur skapningur og er ætlaður at vera í sosialum felagsskapi. Tí er tað sera týdningarmikið at duga sosialan førleika. Gjøgnum lívið velja vit, hvønn felagsskap vit vilja vera í.
Einasta stað vit **noyðast** inn í ein sosialan felagsskap er í fólkaskúlanum. Tá er umráðandi at vera sosialur, tí tá mást tú vera saman við øllum og góðtaka øll, sum tey eru. Tað vil altíð vera so, at summi hava betri sosialan førleika enn onnur.

Flestu flokkar hava tað, vit kalla "floksfund". Tað er upplagt at tosa um vinskap á einum floksfundi. Aðalsetningurin kann vera **"Ver móti øðrum sum tú vilt, onnur skulu vera móti tær"** og sum er verdur at leggja sær í geyma.

Í tannárunum er tað altumráðandi at hava vinir og hoyra til onkran bólk. Hetta er sera týdningarmikið, tí tannáringurin hevur tørv á at spegla sær í sínum umhvørvi og í sínum vinfólkum. Tey vilja so fegin viðurkennast av vinunum og harvið styrkjast at gerast sjálvstøðug og menna sítt sjálvsvirði og harvið sítt sjálvsálit.
Millum Berg og Barbaru er gott vinalag. Tey hava loyndarmál saman. Tey eru trúføst, og tey líta hvørt á annað. (s. 11 og s. 12)

**Skipið fyri floksfundi har "Vinskapur" er á skránni.**

**Uppgávuhugskot: (Floksfundur) Vinskapur**

- Hvat er ein góður vinur?
- Hvat er álit? Hvat er trúfesti?
- Hvussu ert tú sjálv/sjálvur sum vinur?
- Hvussu halda tit Barbaru vera sum vin?
- Tosið um bestu vinir/floksvinir/ítróttavinir ....
- Halda tit, onkur kann vera við í t.d. happing, sjálvt um hann ikki vil, bert tí hann ikki vil vera uttan fyri bólkin hann er í? (kjak)
- Finn eitt orðatak, ið nevnir vinskap.
- Hví er so týdningarmikið at hava vinir?

**Stílur:** "Ein góður vinur"

"Vinskapur"